tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 68 Friggjadagur 11. apríl 1997 71. árgangur Kr. 7,00



*Tíbetur vóru veðurgudarnir við Dúgvuni, tá hon fekk maskinskaða mikudagin.* Mynd: Áki Bertholdsen

# Hevði neyð-ætlan klára

– Hevði tað verið vestfall, ístaðin fyri eystfall, gekk Dúgvan burtur, tá hon fekk maskinskaða mikudagin. Skiparin hevði eina neyðætlan klára í høvdinum Síða 19

## Sparikassin byggir fyri 30-40 milliónir kr í Havn

Síða 9

### Sambandstingmaður við løgmann:





# Hesir skulu koyrast frá

Jákup Joensen, tingmaður Sambandsfloksins, hevur heitt á løgmann um at koyra Sámal Petur í Grund og John Petersen frá sum landsstýrismenn. – Teir røkja ikki størv síni á fullgóðan hátt, heldur sambandstingmaðurin Síða 8

# Løgmaður boðin at vitja Oljunoreg

Bæði norðmenn og føroyingar ynskja samstarv á oljuøkinum.– Innbjóðing at vitja Noreg er tí sera kærkomin,sigur Edmund Joensen, løgmaður Síða 3

# Løgmaður boðin at vitja Oljunoreg

*-Tað hevur týdning fyri meg, nú eg havi ábyrgdina av oljufrágreiðingini, at kunna meg um flest øll viðurskifti sum hava samband við eina oljuvinnu. Tí kemur ein innbjóðing at vitja Noreg og síggja, hvussu oljuvinnan virkar har, sera væl við. Hon er kærkomin sigur Edmund Joensen, løgmaður, sum hevur tikið av innbjóðing at vitja Noreg. Hann fer avstað í summar.*

JAN MÜLLER

Edmund Joensen, løgmaður er boðin at vitja Noreg. Tað er norski orku- og oljumálaráðharrin, sum hevur sent løgmanni, sum umsitur oljumál, at vitja Noreg.

Løgmaður sigur við Sosialin, at hann er sera fegin um hesa innbjóðing og hevur gjørt av at taka av. Hann fer til Noregs einaferð seint í summar.

Tað var annars í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin í fjør, at fráverandi oljumálaráðharrin Jens Evensen segði, at hann fór at taka væl ímóti at fáa eina innbjóðing at vitja í Føroyum fyri at tosa um eitt samstarv á oljuøkinum.

Eftir eftir segði løgmaður Edmund Joensen, eisini í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin, at fekk hann eina innbjóðing úr Noregi, so pakkaði hann kufferttið alt fyri eitt.

Og tað er henda innbjóðing, sum nú er komin úr Noregi. Edmund Joensen sigur, at hann sjálvandi ætlar sær at bjóða norska orkumálaráðharranum henda vegin seinni.

Løgmaður, sum umsitur oljumálið í Tinganesi, sigur, at Føroyar og Noreg eru grannatjóðir og hava felags áhugamál.

-Noreg, sum hevur verið í eini oljuvinnu í mong ár og vit, sum ætla okkum uppí eina slíka vinnu, hava nógv at tosa um, sigur løgmaður, sum enn ikki hevur avgjørt dagin fyri vitjanina ella hvørji onnur fólk verða við. Tað er tó eyðsæð, at onnur fólk í Tinganesi og fólk, sum hava tilknýti til eina komandi oljuvinnu, verða við.

Uppá fyrispurning hvussu tað ber til, at hann tekur av eini innbjóðing av vitja Noregi, tá hann ikki letur við seg koma í sambandi við eina innbjóðing av vitja Bretland, at hann heldur ikki, at umstøðurnar í løtuni lovva eini slíkari vitjan.

Við hesum sipar løgmaður uttan iva til tær samráðingar, sum eru um markið millum londini.

Annars heldur løgmaður tað ikki vera so løgið, at ein føroyskur oljumálaráðharri fer til Noreg at vitja. Nú tá vit vita, hvussu væl teir hava dugað at fingið burtur úr hesum tilfeinginum.

-Viðurskiftini í báðum londum líkjast nógv, og tað skuldi tí eisini verið nógv at lært av júst norðmonnum, áðrenn vit fara í gongd við eina oljuvinnu.

Løgmaður vísir eisini á, at nú hann skal standa við ábyrgdini av stóru oljufrágreiðingini, tá hon kemur, so hevur tað týdning fyri seg at kunna seg um viðurskiftini.

-Eg havi ætlan um at prioritera hetta økið sera høgt, og tí havi eg avgjørt at taka av innbjóðingini til Noregs.

Edmund Joensen, løgmaður til Noregs at kunna seg við oljuvinnuna har.



*Norsk oljufeløg hava stóran áhuga fyri at vera við í leitingini við Føroyar og tað fer ikki víka, at ikki okkurt av feløgunum bankar á dyrnar hjá løgmanni í Tinganesi. Nú er tað so løgmaður, sum fer til Noregs at líta kring seg. Her eru tað umboð fyri oljufelagið Saga, sum skulu til at hitta løgmann, sum umsitur oljumál*



*Vitjan løgmans í Oljunoregi kemur í kjalarvørrinum á teimum avtalum, sum eru gjørdar millum norskar og føroyskar útbúgvingarstovnar. Helst verður høvi hjá løgmanni at hitta føroyingar sum útbúgva seg innan oljuvinnuna í Noregi*


| SKEIÐÆTLAN | Apríl | Mai |
|---|---|---|
| Access 7.0 | | 22.–23. |
| Excel 7.0 | 10.–11. | 15.–16. |
| Internet | 15. | 13. |
| Internet Heimasíður | 16. | 14. |
| Navigator | 7.–9. | 5. |
| Windows 95 | 14. | 12. |
| Word 7.0 | | 20.–21. |

ACCESS 7.0 WINDOWS 95 INTERNET WORD 7.0 NAVIGATOR EXCEL 7.0

FØROYA DATA SKÚLI

Tilmelding og fyrispurningar:
Føroya Dataskúli
Brekkutún 1
188 Hoyvík
Tlf. 16173
Fax 16116

Internet:
fds1@olivant.fo

DAGSSKRÁ
Undirvísing Kl. 9.00 - 16.00
Í døgurðasteðginum kl. 12.00 - 13.00 bjóðar skúlin okkurt til matnað. Steðgur er fyrra- og seinnapart, har skúlin bjóðar kaffi/te við onkrum afturvið.